

# Jarðfeingi vertur fyri fundi um sjóvarhita í Arktis

Deil:

**Jan Müller**

06.11.2014 - 13:42

Oljan.fo

Vikuskiftið frá 10. til 12. oktober 2014 var Jarðfeingi vertur fyri arbeiðsfundi í bólkinum “Arctic Ocean Heat Project”, sum er norðurlendskur arbeiðsbólkur við umboðum úr Íslandi, Føroyum, Grønlandi og Noregi. Hetta er annar fundurin í bólkinum. Bólkurin skal útgreina, hvussu til ber at brúka hita úr sjónum til upphiting í býum og bygdum, sum liggja fram við strendurnar í londum í norðurhøvum og í Arktis. Hetta við at brúka meira umhvørvisvinarligar ella grønar loysnir.

So heldur enn at brúka oljufýr ella elektriska orku til beinleiðis upphiting við hitalikami, verður mælt til at brúka hitapumpur sum fáa nyttu úr hitanum, sum er í sjónum. Ein avbjóðing er, at sjógvurin summastaðni er ógvuliga kaldur um veturin, og tí skulu serligar skipanir brúkast á hesum støðum.

Umframt fundarvirksemi har umboð fyri SEV, Fjarhitafelagið, Landsverk, Landssjúkrahúsið og SMJ vóru við partar av tíðini, varð vitjað í Nólsoy, á Boðanesheiminum, í Lorvík, Í Klaksvík, hjá SEV og í Betesda.
Nærri fæst at vita um ætlanina á Arctic Ocean Heat Project skrivar Jarðfeingi á síni heimasíðu.